Seturskúli við Norrønu til Íslands

17. – 20.apríl



Mánadagur 17. apríl 2023

Vit fara ikki í skúla, men møta á Farstøðini í seinasta lagi kl. 11. Eftir ætlan leggur Norrøna frá landi kl. 13. Landgongin verður tikin kl. 12.

Vit kekka-inn, beint áðrenn vit fara umborð.

Passini og tryggingarkortini, ið tit longu hava klistrað í passini, skulu handast Lydiu og Jens Martin, tá vit eru komin umborð. Tey, ið hava tørv á sjóverkstablettum geva Rana og Guðný tær at umsita.

Kl. 13.00 Miðmáli í Nóatúni

Kl. 13.00 Fráferð (Landgongin verður tikin kl. 12)

Kl. 14.00 Svimjihylurin, sauna og fitness hava opið

Kl. 17.00 Hitapottarnir hava opið

Kl. 17.30 Matstovurnar hava opið

Kl. 20.00 Live-tónleikur í Undirhúsinum

Týsdagur 18. apríl 2023

Kl. 07.00 Morgunmatur í Nóatúni og Skansagarði

Kl. 07.00 Svimjihylurin, sauna og fitness hava opið

Kl. 10.00 Koma til Seyðisfjørð (ísl.tíð)

Norrøna leggur at í Seyðisfirði kl. 9.

Kl. 07.30 eta vit morgunmat saman á Skansagarði. Takið svimjiklæði, handklæði, ryggsekk og annað, tit hava tørv á við. Vit fáa matpakkar frá Smyril Line at hava við á dagstúrinum.

Vit fylgjast í land og fara í buss okkara og koyra til Dimmuborgir, Námaskarð og Mývatn. Her hugna vit okkum, hyggja at íslendska landslagnum og svimja í heitum undirgrundsvatni. Frá Seyðisfirði tekur tað umleið 2,5 tíma at koyra til Mývatn.

Út á seinnapartin koyra vit aftur til Seyðisfjarðar og eta nátturða saman umborð á Norrønu. Eftir nátturðan er fríløta.

Viðvíkjandi mati umborð, so er okkara ferð "all-inclusive". Vit fáa hvør sítt matararmband, ið gevur okkum atgongd til máltíðir og matpakkar umframt drykkjuvørur til útferðirnar.

Máltíðirnar eru:

Morgunmatur	kl. 07.00 – 10.00
Døgurði	kl. 12.00 – 14.00
Nátturði	kl. 18.00 – 20.00

Mikudagur 19. apríl 2023

Møtast til morgunmat kl. 7.30.

Kl. 9.00 fara vit í land og koyra til Neskaupstaðir. Har eru útisvimjihyljar við rusjibanum og heitum pottum. Her hugna vit okkum nakrar tímar, og um tíð verður til tað, ganga vit okkum ein túr. Á veg heimaftur steðga vit á Egilsstøðum at keypa.

Vit skulu verða umborð á Norrønu kl. 19.00, tí hon leggur frá landi kl. 20.00 (ísl.tíð).

Hósdagur 20. apríl 2023

Vit sova til vit vakna, men skulu tó hava etið morgunmat áðrenn kl. 10.

Fríløta, har vit hugna okkum, spæla borðspøl og gera annars tað, okkum lystir.

Eftir ætlan leggur Norrøna at í Tórshavn kl. 16.00.

Minnist til:

- Á ferðini umboða vit Føroyar, Skúlan við Løgmannabreyt, okkum sjálvi og foreldur okkara. Latið okkum tí umboða hesi væl!
- Vit eru umborð á Norrønu saman við nógvum øðrum ferðandi úr nógvum londum. Tí kunnu vit ikki tuska og spæla, sum vit vilja. Vit mugu vísa virðing fyri øllum við góðum atburði.
- Í seinasta lagi kl. 00.00 eru øll í sínum kamari. Summi vilja sova – og tað skulu tey sleppa.
- Vísið góðan fólkaskikk og høviskan atburð!

Hetta skulu tit hava við:

- Pass, tryggingarkort og lummapening við skili.
  G.G. Allur matur umborð, matpakkar til útferðir og felagstiltøk, so sum Mývatn og svimjing **ER** hava vit goldið. Um lummapeningur er í reiðum peningi ella á korti, avgera tit sjálvi.
- Toiletlutir (tannbust, tannkrem, sjampo o.s.fr.)
- Hóskandi klæðir og skógvar til útferðir og at vera í umborð.
- Lítlan ryggsekk til útferðirnar.
- Helst 2 sett av svimjiklæðum og 2 handklæði.
- Kortspøl og borðspøl til hugna og samveru umborð.
- Tað er loyvt at hava fartelefon við, men tað er sera umráðandi,

  at vit eru "saman" á túrinum, og um vit meta, at telefonin fer við ov

  nógvari tíð, so samla vit telefonirnar inn.